Richard Mortensen, ráðgevi í heimsins størsta ráðgevingarfelag:

Føroyingar eiga nú at gera íløgur í framtíðina

Richard Mortensen, ráðgevi heldur at føroyingar nú mugu fara at hugsa um framtíðina

Eitt av okkara størstu mistøkum hevur verið, at vit hava ikki hugsað um framtíðina. Vit hava bert hugsað um dagin í dag. Alt ov stórar íløgur eru gjørdar í ein yvirkapacitet í fiskivinnuni og í ein yvirbygdan infrastruktur. Alt ov lítið hevur verið hugsað um at seta pengar av í teimum góðu tíðunum til inntøkugevandi arbeiði. Og vit hava borið okkum at sum ein kaffitjóð tvs. at vit hava bert dúvað upp á eina stóra inntøkukeldu. Tað var skeivt. Nú mugu vit til at hyggja frameftir. Gevast við at kúra um fortíðina og stúra um framtíðini. Tað ræður um at síggja møguleikarnar og troyta teir rætt. M.a. hetta sigur Richard Mortensen, ráðgevi í eini av heimsins størstu ráðgevarafyritøkum, "PA Consulting Group" við Tíðindablaðið Sosialin, sum júst hevur vitjað hann á skrivstovuni í Keypmannahavn.

Orð og myndir Jan Müller

Ein spurningur, sum hevur verið nógv umrøddur í Føroyum í sambandi við ta skeivu gongdina í 80-unum er skeiv og manglandi professionell ráðgeving.

Herfyri vitjaði Tíðindablaðið Sosialurin í Keypmannahavn. Har nýttu vit høvi til at tosa við ein ungan føroying, sum í dag arbeiðir hjá heimsins størstu ráðgevarafyritøku, tí heimsumfatandi ensku fyritøkuni "PA Consulting Group."

Hann eitur Richard Mortensen og kemur av Argjum. Hann hevur rættiliga greiðar meiningar um støðuna í Føroyum, hví tað er gingið galið og hvat kann gerast fyri at venda gongdini aftur.

Men hvør er so henda fyritøkan, sum sigur seg standa fyri fremstu og bestu ráðgevingini í heiminum?

-Fyritøkan byrjaði í 1943. Tá var tað ein maður, sum helt, at ein kundi effektivisera fyritøkur - ikki bert við at seta ferð á sjálva framleiðsluna við samlíbandsarbeiði men heldur við at fáa tey røttu fólkini á rætta stað - rætt og slætt - at økja um effektivitetin við betri trivnaði.

Fyrsta verkætlanin, sum fyritøkan fullførdi, var at økja munandi um framleiðsluna av teimum heimskendu Spitfire-flogførunum.

Síðani vaks fyritøkan og miðskeiðis í 50-unum varð stovnaður ein grunnur, sum ger fyritøkuna til ein sjálveigandi stovn, har tað síðani verða gjørdar stórar íløgur í at útbúgva og menna síni egnu starvsfólk.

Í dag er "PA Consulting" ein av heimsins størstu ráðgevandi fyritøkum við meira enn 3000 fólkum í arbeiði

Leiðsluráðgeving

Hvat tekst fyritøkan so við?

Hon tekur sær av leiðsluráðgeving. Tvs. hvussu ein leiðsla skal bera seg at í framtíðini: hvørjar visiónir ein eigur at hava, hvussu ein røkkur hesum visiónum og hvørjar íløgur eiga at verða gjørdar til tess at røkka sama endamáli.

Fyritøkan arbeiðir eisini við teldusamskifti, hvussu ein troytir tær menniskjansligu resursirnar, hvørja strategi ein eigur at velja tvs. um ein fyritøka skal fasthalda verandi kós ella kanska heldur leggja seg eftir øðrum.

Richard Mortensen sigur, at teir arbeiða við at betra dygd og effektivitet í arbeiðinum. Eisini verður arbeitt innan teknologi, tvs. hvussu ein skapar nýggjar vørur og nýggjar framleiðsluhættir.

Høvuðsskrivstovan er í London, meðan teknologisentrið er í Cambridge.

Fyritøkan arbeiðir í 24 ymsum londum. Á skrivstovuni í Keypmannahavn, sum dekkar øll Norðurlond, arbeiða 200 fólk og teirra millum eisini Richard Mortensen, sum hevur eitt rættiliga týðandi starv í fyritøkuni.

Ráðgevir stjórum

Vit spurdu Richard, hvussu hann arbeiðir!

Hann hevur samband við fyrisitingarligu stjórnirnar í nógvum fyritøkum so sum Leif Erikson, Electrolux, Danisco. Teir møtast ofta til ein kopp av kaffe.

Tá stjórin hevur okkurt hann vil út við og viðgera, so verður tosað um tað. Tað kann vera, at hann er vorðin varugur við, at vøksturin hjá fyritøkuni er steðgaður upp. Tá er arbeiðið hjá ráðgevanum at finna nýggjan innblástur við eitt nú at síggja tingini við nýggjum brillum.

Hetta er ein rættiliga týðandi partur av mínum arbeiði sigur Richard Mortensen.

Royndir hansara eru tær, at tær góðu fyritøkurnar eru tær, sum viðganga, at ein hevur ikki nokk í sær sjálvum men at ein alla tíðina eigur at leita íkring seg, arbeiða og hugsa internationalt og royna nýggja og óroyndar leiðir. Tað ringasta ein kann gera er forskansa seg frá umheiminum. Tá stagnerar og sovnar ein fyritøka og henni verður ikki leingi lív lagað.

Tvørturímóti eigur ein alla tíðina at fara út og innheinta nýggjar impulsir uttanífrá eitt nú við at skipa fyri samarbeiði ella alliansum við aðrar fyritøkur og ikki neyðturviliga innan somu framleiðslu. Tá kann hugsast, at ein fyritøkur, sum arbeiðir innan fiskaframleiðslu tekur upp eitt ávíst samarbeiði við eina fyritøku, sum arbeiðir innan vørumerking fyri bert at taka eitt dømi.

Hægri handilsskúla

Men hvørja bakgrund og hvørjar fortreytir hevur Richard Mortensen fyri at arbeiða í eini slíkari vælkendari og nógv bruktari ráðgevarafyritøku?

Hann tók nøkur ár herfyri Cand merc útbúgving í Keypmannhavn við sergrein innan strategi og marketing. Tað vanliga bæði tá og framvíðanundan hjá slíkum ungu og nýklæktum fólki var at leita heimaftur til klettarnar og har fáa sær væl lønt og týðandi størv. Hetta var ikki tað, sum lá fyrst í huganum hjá Richard. Hann helt tað vera rætt at fáa sær egnar royndir og avbjóðingar, áðrenn farið varð heim til Føroya at arbeiða. Hetta metti hann rættiliga avgerandi og kemur hann eisini meira inn á henda spurningin seinni í prátinum.

Til London

Richard og konan valdu heldur at fara út um ríkið at royna eydnuna - at vita um ikki har vóru nýggjar avbjóðingar, sum kundu vera ein góð ballast seinni í lívinum.

Hóast tey einki arbeiði høvdu so keyptu tey einvegis ferðaseðil til Onglands. Har ráddi so um sjálvur at taka initiativið og við útbúgving síni sum bakgrund skipaði Richard fyri fundum við fyritaksstjórar í konsolentfyritøkum innan sítt egna øki management consulting.

Síðani fekk hann arbeiði hjá eini fyritøku, sum arbeiðir við vørumerking, har hann tók sær av tí strategiska partinum.

Richard leggur sjálvur stóran dent á hetta við eini strategiskari leiðslu. Tvs. at ein fyritaksstjóri alla tíðina setur sær nýggj mál fyri ikki at stagnera.

Richard fór síðani at

→

→

arbeiða sum meinigur konsolentur og upplivdi hann hesa tíð nógv áhugavert og gevandi. Hann fekk nógvar avbjóðingur og lærdi nógv hesa tíðina í London, har hann arbeiddi fyri bæði japanskar, amerikanskar , týskar, danskar og svenskar fyritøkur. Tað var her hann kom í samband við PA Consulting Group.

At byrja við var hann limur í einum ráðgevarabólki, seinni gjørdist hann leiðari í hesum bólkinum.

Richard var tvey ár í London og varð síðani fluttur til Keypmannahavnar, har hann hevur arbeitt í meira enn trý ár

Øll eru líka

Men hvussu var tað at vera føroyingur og so fara upp í ráðgeving á altjóða støði eftir so stuttari tíð? Og hvørja ballast hann hevði við sær úr Føroyum, tá hann fór inn í eitt slíkt krevjandi og nýtt starv sum ráðgevi hjá fyritaksstjórum á fleiri av teimum stóru fyritøkunum?

-Jú ein eginleika hevði eg við mær úr Føroyum, og tað var frá arbeiði mínum í Sjóvinnubankanum, var tann, at eg tey tvey árini í bankanum lærdi at avmystifisera mína virðing fyri vinnulívsmonnum og stórum kanónum. Har var eg uppi í so nógvum ymiskum projektum og fann fram til, at vit eru øll líka. Hetta hjálpti mær nógv, tá eg skuldi til at tosa við og ráðgeva fleiri av teimum stóru kanónunum í stórum altjóða fyritøkum.

Nú Richard hevur møguleika at eygleiða gongdina og støðuna í Føroyum uttanífrá spurdu vit hann, hví alt er gingið galið í Føroyum!

-Tað er sjálvandi ringt at svara stutt. Men eg haldi vit hava ikki verið ambitiøs nokk. Tvørturímóti hevur hetta at vera ambitiøsur verið mett at vera nakað negativt.

Forkelaðir

Hyggja vit at seinnapartinum av 70-unum og fyrst í 80-unum, sigur Richard víðari, so siggja vit, hvussu mangir føroyingar, ið hava nomið sær útbúgving í útlandinum, koma heimaftur í stórum tali. Her var í veruleikanum talan um nakrar forkelaðar føroyingar, sum fyrst fingu sær eina útbúgving og so alt fyri eitt fóru heimaftur, uttan at hava sett sær onnur mál fyrst, sum eitt nú at fáa sær royndir í úthieminum.

Hesir útbúnu føroyingarnir fingu forerandi størv á einum silvurborinski, størv til 30.000 kr. um mánaðin, uttan at hava nakrar royndir í heila tíkið.

Richard Mortensen heldur ikki, at føroyska samfelagið hevur fingið tað burtur úr hesum lærdu fólkum, sum tað átti. Tí hesi fólk eru komin beint av skúlabonki í týðandi størv. -Sammeta vit við t.d. nógvar danir, so nema teir sær nógvar royndir, áðrenn teir fáa slík arbeiði, sum føroyingarnir fingu tey góðu árini í 80-unum.

-Eg havi tosað við mangar av hesum føroyingum, og tað tú legði til merkis var, at teimum tørvaði altjóða royndir. Hugburður teirra hevur verið og er, at eingin skal siga teimum ímóti ella vita betur.

Útlendingar - og her teljast danir eisini - hinvegin afturímóti, sum arbeiða veruliga internationalt, eru til eina og hvørja tíð tilreiðar at hoyra onnur sjónarmið. Hesi fólk eru ikki bangin fyri at viðganga, at tey ikki vita alt. Tey eru tí eisini móttakilig fyri góðum ráðum vísir Richard á, og sum ráðgevi hjá mongum leiðarum og stjórum hevur Richard drúgvar royndir júst at kunna úttala seg um hesi viðurskifti.

Samfelagið átti at sett størri krøv

-Ístaðin fyri at taka so ókritiskt móti hesum útbúnu føroyingunum, sum komu heim beint av skúlabonki, átti samfelagið at sagt teimum, at teir fyrst skuldu fara í útlandið at arbeiða og fáa sær royndir.

Richard vísir á eitt dømi frá sínum egna arbeiði. -Eg veit, hvussu stórar fyritøkur arbeiða. Ein slík er Erikson í Svøríki. Søkir tú arbeiði í eini slíkari fyritøku, og tú hevur góð pappír og júst liðugur við útbúgvingina, so kanst tú gott fáa sum svar, at umsóknin er áhugaverd, men royn teg fyrst í nøkur ár, har tú møtir mótgangi eisini. Tað er tann besta bakkgrundin víðari. So kanst tú koma aftur og søkja um arbeiði.

-Hetta áttu vit at havt gjørt meira av heima í Føroyum, og tá hevði kanska eisini sæð øðrvísi út. Tá tú sum føroyingar t.d. situr og samráðist við professionellar keyparar í útlandinum, ella talan er um týðandi politiskar samráðingar, tá dugir tú ikki nóg væl at skilja nyansurnar ella politiska spælið, um tú ikki hevur roynt at arbeiða í útheiminum og sita hinumegin borðið. Nettup hetta er ein av orsøkunum til, at svenskar fyritøkur eru so langt framman fyri tær donsku. Hetta duga sviar nevniliga.

Ikki gjørt íløgur í framtíðina

Vit fara at tosa meira um gongdina í føroyska samfelagnum og Richard heldur fyri: -Eitt av stóru mistøkunum hevur verið, at vit hava als ikki gjørt íløgur í framtíðina. Ístaðin fyri hava vit gjørt íløgur í ein yvirbygdan infrastruktur. Hevði tað ikki verið betri, um hesar íløgur í størri mun vórðu gjørdar í meira inntøkugevandi arbeiði spyr Richard Mortensen og heldur fram:

-Vit áttu so avgjørt at lært av okkara mistøkum. Og eitt av hesum mistøkum eru eisini tey fólk, sum hava stýrt. Støðan hevði kanska verið heilt øðrvísi, um vit í størri mun høvdu sett saman bólkar við fólkum við fleiri altjóða royndum at tikið sær av stórum og avgerandi málum.

Í nógvum førum hevði tað lønt seg hjá føroyingum at leigað onkran útlending at tikið sær av týðandi samráðingum ella at ráðgivið eitt nú landsstýrinum í avgerandi málum.

Vit mugu vera meira opin fyri umheiminum og mugu til at arbeiða meira internationalt. Vit mugu finna fram til, hvørji útbúgvin fólk framtíðar Føroyar hava brúk fyri - og tey fólk, sum útbúgva seg, mugu fáa sær royndir burturi, áðrenn tey koma heimaftur. Tá tey koma heimaftur eiga tey at spyrja, hvat tey kunnu gera fyri Føroyar og ikki hvat Føroyar kunnu gera fyri tey heldur Richard Mortensen.

Richard Mortensen sigur, at tað er sera umráðandi, hyggja vit inn í framtíðina, at vit ikki bara líta teimum, sum hava ráðgivið frammanundan, alt til. Heldur skuldi verið hugsað um at sett saman nýggjar ráðgevarabólkar og har hesi fólkini ikki finnast í Føroyum, so at farið í útlandið eftir hesi ekspertisu.

Lata eina fyritøku í til samráðingar

Nú so nógvar týðandi samráðingar hava verið við danir spurdu vit Richard Mortensen, um ein fyritøka sum teirra hevði viljað ráðgivið landsstýrinum?

-Vit blanda okkum ikki upp í politikk. Men høvdu vit eina slíka uppgávu, so er greitt, at vit fyrst og fremst høvdu hugt at ítøkiligum upplýsingum, soleiðis at grundarlagið varð í lagi. Vit hava mangan ráðgivið stórum fyritøkum undan týðandi samráðingum og meta vit tað vera fremsta uppgávan fyri tað fyrsta at kortleggja alt, fyri síðani at lata fyritøkurnar í, soleiðis at tær eru tilreiðar at møta mótpartinum.

Kaffitjóð

-Nú hevur tað oftani verið sagt, at skeiv ráðgeving frá sakførarum, bankum, grannskoðarum o.o. er ein av orsøkunum til syndarligu støðuna í Føroyum'

-Tað eg vil siga um hatta er, at vit føroyingar hava borið okkum at sum ein kaffitjóð. Tvs. at vit bert hava dúvað upp á eina stóra inntøkukeldu, nevniliga fiskin. Hetta er ein høvuðsorsøkin til ringu støðuna. Yvirskotið frá hesi høvuðsvinnu er komið inn í landið sum tøkur peningur og hevur bert verið brúktur til at gera íløgur í deyð ting, antin í "kaffi" (tvs. yvirkapacitet í fiskivinnuni) ella infrastruktur út í tað óendaliga.

Richard heldur, at føroyingar áttu at havt hugsað meira um, hvussu sárbarur ein er, tá ein bert hevur ein ídnað at líta á. Tá áttu føroyingar at hugsað um, hvussu vit fingu eitt bein aftrat at standa á. Tvs. longu í 70-unum, tá allir pengarnir byrjaðu at streyma inn í landið, áttu føroyingar at lagt seg eftir at gera íløgur í nýggjar vinnuvegir tvs. sumt, sum er nær tengt at fiskivinnu og eisini annað.

-Eg vóni, at vit hava lært av hesum so grundleggjandi mistøkunum, tá vit í framtíðini fara undir nýggjar vinnur sum t.d. eina oljuvinnu. At vit tá brúka pengarnar til skilagóðar íløgur í aðrar vinnur, soleiðis at vit ikki endurtaka støðuna vit hava verið í, tá 98% av allari framleiðslu hevur verið fiskur.

Megna nógv bara vit vilja tað sjalvi

-Vit mugu koma hugburðinum bara at hugsa um her og nú til lívs. Vit mugu gera íløgur, sum seinni kunnu geva nakað av sær. Richard Mortensen heldur, at okkum hevur manglað fólk, sum hava havt kunnleika til fígging og fyrisiting. Veiðumentanin, sum hevur verið galdandi, hevur bert snúð sum um dagin í dag. Eingin hevur havt tað stóra útsýnið við at hyggja 10-15 ár fram í tíðina.

Men hvat megna bert 45.000 menniskju spurdu vit Richard. Hann er rættiliga avgjørdur og sigur, at tað at vera fáment og bert 45.000 menniskju er ikki nøkur avmarking í sær sjálvum. Tað er ein spurningur um hugburð, um vilja og sjálvandi kunnleika.

Richard Mortensen, sum hevur ráðgivið mongum svenskum fyritøkum, vísir á dømi frá Svøríki, har smærri pláss, ið hava mist øll arbeiðsplássini, bróta upp um armar og royna av nýggjum. Eitt nú ein kommuna í Svøríki, sum fór undir eina verkætlan, har farið varð undir at gera leikur. Fólk settur sær fyri, at hetta skuldi bera til, og tað bar til. Øll rávøran varð innflutt og varð bara arbeitt úr træi. Í dag fær kommunan milliarda inntøkur frá hesi verkætlanini, sum byrjaði, tí fólk vóru málbevíst og høvdu vissiónir og tí tey tordu at satsa upp á framtíðina.

Eg haldi, at hóast vit føroyingar eru fámentir, so kundu vit eisini farið undir slík. Men fortreytin er, at tú vil nakað og hevur vissiónir.

Framtíðin

Men hvat heldur Richard Mortensen so, at føroyingar eiga at gera fyri at koma uppundan aftur og fáa trúnna á aftur framtíðina?

-Beint nú snýr alt sum um politikk, so tað er torført at hugsa um nakað ítøkiligt. Men tá hetta hevur lagt seg, haldi eg vit

→

eiga at byrja av nýggjum við m.a. at effektivisera fiskivinnuna og te. er m.a. at sleppa okkum av við yvirkapacitetin og heldur fáa meira burtur úr tí, sum lønandi vinna fæst burtur úr.

Síðani eiga vit at gera fløgur í aðrar vinnur. Vit mugu vera meira opin og ikki vera bangin fyri at taka móti góðum ráðum. Vit eiga eisini at hyggja meira út um landoddarnar og fáa vit so leiðarar, sum hava drúgvar royndir í útlandinum, so vil tað sjálvandi vera tað besta.

-Vit skulu so heldur ikki bera ótta fyri øðrum tjóðum. Heldur eiga vit at taka upp eitt ítøkiligt samarbeiði eitt nú við norðmenn og íslendingar á tí stóra marknaðinum.

-Men hvat er so mest umráðandi at gera at fáa eitt sunt og gott vinnulív aftur í Føroyum?

-At vit fyri tað fyrsta koma korruptiónini og kunstigu kappingini til lívs. Vit mugu koma burtur frá vina- og kenningarpolitikkinum og vit mugu til at kappast út frá veruligu umstøðunum. Vit mugu tosa meira saman, bygdanna millum og eisini oyggjandi millum, heldur enn at kappast sínámillum hvør móti øðrum.

Richard Mortensen heldur tað eisini vera av týdningi, at tað í politisku skipanini finst ein ella onnur informatiónsskipan, sum kann koma við ávaringum í góðari tíð um altjóða rembingar, soleiðis at vit ikki aftur fáa ein slíkan hvøkk, sum vit fingu hesaferð.

-Síðani haldi eg tað er av stórum týdningi, at tey fólk, sum hava fingið sær útbúgving í útlandinum og sum koma heimaftur at arbeiða, at tey fara til arbeiðis við tí hugburði, at tað eru tey, sum skulu gera nakað fyri Føroya og ikki øvugt. Higartil hevur talan verið alt ov nógv um ein kuvøsumentalitet í Føroyum, har virðingin fyri pengum hevur verið so sum so, og tað hevur verið hugsað ov nógv um bara at fáa sína føstu løn eina ferð um mánaðin.

Richard Mortensen heldur tað eisini vera av týdningi, at føroyingar nú gera sær greitt, hvørji útbúgvin fólk samfelagið fer at hava mest brúk fyri í framtíðini og í hesum sambandi heldur hann tað hevði verið gott, um føroyingar eisini fóru í onnur lond at útbúgva seg sum t.d. til USA, Onglands, Týskalands fyri bert at nevna nøkur. Tað hevði kunnað givið føroyska samfelagnum nýggjar og týðandi impulsir.

Richard Mortensen uttanfyri nýggju skrivstovubygningin við Ítróttarparkina í Keypmannahavn, har hann og 200 onnur starvast

Ikki kúra og stúra

Richard Mortensen er millum teirra, sum heldur, at vit - umframt at læra av gjørdum mistøkum - eiga at hyggja framefur og taka av nýggjum avbjóðingum. Tað ber ikki til bara og sita og kúra yvir fortíðina og stúra um framtíðina. Tað, sum er farið, er farið. Vit skulu nú til at samarbeiða og finna fram til, hvørji nýggj øki vit skulu gera fløgur í í framtíðini og sum fara at geva nakað av sær til landið og fólkið her býr.

Richard Mortensen tekur undir við teimum, sum siga,a t vit heldur enn bara at framleiða blokk eiga at leggja okkum eftir at góðska fiskin meira. Men tað tekur tíð at byggja hetta upp. Hann heldur fyri, at ein av vansunum hevur verið, at alt ov nógvir sannleikar eru vornir dikteraðir føroyingum og góðtiknir uttan viðari. Hetta m.a. tí at vit hava verið ein alt ov afturlatin tjóð. Vit áttu at havt verið meira opin móti vegis umheiminum og ikki verið bangnir fyri at tikið upp samarbeiði við aðrar.

-Flestu fyritøkurnar eg arbeiði saman við, arbeiða saman við kappingarneytunum við eitt nú granskingarætlanum. Í Føroyum hava vit ístaðin fyri stongt okkum inni sum í eini skel, og júst eru tað summir "sannleikar", sum eru góðtiknir sum verandi lóg. Og har kemur so eisini spurningurin um blokk og nú forelding inn í myndina. Alt ov leingi hevur blokkframleiðslan verið mettur sum ein av hesum sannleikum. Latið okkum vóna, at tíðin, tá vit lokaðu okkum inni og ikki vildu síggja í eyguni. hvat hendi rundan um okkum, er farin.

Richard Mortensen hevur eisini nógvar tankar um eina komandi oljuvinnu. Hann var við á oljuráðstevnuni í Havn herfyri, og tá hittu vit hann og tosaðu um møguleikar ol. í eini oljuvinnu. Lesið um tað í næstu viku.

Aftursvar til Hergeir Nielsen

Í Fjúrtanda nr. 58 hevur Hergeir Nielsen, løgtingsmaður og nývaldur sjúkrahússtýrislimur fyri Suðuroyar Sjúkrahús, nakrar spurningar til mín.

Fyrst skal sigast til hansara rós, at spurningarnir, níggju í tali, eru sera kontantir, og vil eg royna at svara á sama hátt, so vítt tað er gjørligt.

1. Hvørjar politiskar kreftir driva landsstýrismannin í heilsumálum til at nerta við sjúkrahússkipanina?

Svar: Tað eru mínar egnu politisku kreftir, sum driva meg. Í tí lótu ein politikari, sum er valdur til at sita við ábyrgd, ikki torir at nerta við eina skipan, sum hann veit, kann fáast til at virka betur, eigur sami politikari at leggja frá sær.

2. Hví verður farið til Danmarkar at seta danskar embætismenn, føddar og uppvaksnar í Danmark, at ráðgeva føroyingum í føroyskum heilsuváðurskiftum?

Svar: Heilsumál eru felagsmál. Føroyska heilsuverkið er undirlagt eftirlit frá donskum heilsumyndugleikum.

Starvsfólkið innan heilsuverkið er næstan alt útbúgvið í danmark ella sambært líknandi útbúgvingum.

Men hetta vóru ikki beinleiðis orsøkirnar. Talan var eisini um eitt tilboð frá danska heilsumálaráðharranum.

Høvuðsorsøkin var ein roynd at fáa eina frágreiðing, sum ikki skuldi verða skírd fyri at vera ósaklig, ókvalifiserað ella lokalpolitiskt litað.

3. Hví sigur landsstýrismaðurin, at danska nevndin er glíðin í sínum setningi, tá ið hon ikki er tað?

Svar: Arbeiðssetningurin var m.a. at tey trý sjúkrahúsini skuldu varðveitast við eini læknaligari forsvarligari manning. Eg haldi ikki, at kommunulæknar, við allari virðing fyri teirra arbeiði, at teir koma undir heitið at vera ein forsvarlig manning, tá ið talan er um sjúkrahúsarbeiði. Tað var heldur ikki tað, sum landsstýrið legði á týdningin av arbeiðssetninginum.

Model A (næstan øll frágreiðingin) mælir frá yvirlæknum og sjúkrahúslæknum á teimum smáu sjúkrahúsunum, men bert brúk av kommunulæknum til sokallaðu prehospitalsviðgerðina. Tískil meti eg nevndina vera glíðnað í arbeiðssetninginum.

4. Var tað bara talan um inkompetansu, tá landsstýrismaðurin kunngjørdi at hann fór at fylgja nevndarálitinum, sum ikki var atkomið?

Svar: Landsstýrismaðurin var tó ikki so inkompetentur, at hann segði, at hann slaviskt fór at fylgja álitið um stav fyri stav. Eg havi sagt, at politiska myndugleikanum tørvaði eitt umboð til tess at fremja ein framtíðar heilsupolitikk við. Við tí fortreyt, at arbeiðssetningurin varð fylgdur, vildi eg uttan iva kunnað tikið undir við tilmælinum. Men vitandi til svarið til spurning trý, er hetta ikki møguligt.

5. Hví verða júst teir føroysku embætismenninir við teimum kendastu møðsavnandi áhugamálunum settir at ráðgeva teimum fremmanda embætismonnunum?

Svar: Til tess at útvega nevndini neyðugar upplýsingar og annars sum sergkunnir á ókinum valdi landsstýrið sjúkrahússtjóran í nevndina. Eitt annað val hevði væl saktans verið tøgið.

Hin seinni embætismaðurin, landsstýrið valdi, var deildarstjórin í Tinganesi. Hesin hevði fortreytir fyri at kenna landsstýrisins endamál við frágreiðingini og er annars eisini tann embætismaðurin, sum hevur samskiftið við donsku heilsumyndugleikarnar, tá ið tað er neyðugt.

6. Hví verða júst teir føroysku embætismenninir kommunu og sjúkrahúslæknarnir í Suðuroy og Norðoyggjum, við tí staðkendastu serkunnleikanum, krógvaðir fyri nevndini hjá landsstýrismanninum?

Svar: Nevndin fekk tey fólk í talu, sum nevndin ynskti.

7. Hví er ovasti embætismaðurin í føroyska heilsuverkinum landslæknin ikki spurdur til ráðs?

Svar: Landslæknin var á fundi við limir í ráðgevingarbólkinum. Hetta eftir ynski frá dønum.

8. Hví sigur landsstýrismaðurin í heilsumálum ósatt, tá ið hann sigur, at løgtingið og fíggjarnevndin hava vrakað eitt álit, sum hvørki er framlagt, viðgjørt ella sett undir atkvøðugreiðslu á tingi?

Svar: Meirilutin í løgtingsins fíggjarnevnd sigur í felagsálitinum í sambandi við viðgerðina av lániheimildini og avtaluni frá 12. okt. 1993: »Annars ger meirilutin vart við og undirstrikar, at bygnaðarbroytingarnar á heilsuøkinum, ið verða umrøddar undir punkt a í avtaluni, ikki verða gjørdar við støði í álitinum frá »Rådgivningsgruppen vedrørende sundhedsvæsenet på Færøerne«, soleiðis sum skotið varð upp í danska uppskotinum til avtalu«.

9. Hvat í allari víðu verð fær landsstýrismannin til at tragva, at hann her á landi fær nakra undirtøku til at avtaka sjúkrahússtýrini og at leggja stýrini undir triumviratið Eidesgaard, Joensen og Weihe?

Svar: Landsstýrismaðurin er ikki partur av nøkrum triumvirati, hvørki hesum, nevnt verður, ella nøkrum øðrum.

Eg havi alment boðað frá, at eg haldi tað vera rætt bert at hava eitt stýri. Grundgevingini fyri hesi uppfatan míni greiddi eg m.a. Hergeiri Nielsen frá á felagsstýrisfundinum 18. november 1993. Men landsstýrismaðurin kann ikki fremja hesa ætlan, tað kann bert ein meirluti á løgtingi.

Í stubbanum við síðuna av spurningunum endar Hergeir Nielsen við at spyrja, hvønn politikk eg royni at reka á hesum øki.

Uppgáva mín í høvuðsheitum er, at vit fáa tað optimala útnyttulsi av játtanini, soleiðis at hvør króna, sum brúkt verður, kemur skattgjaldaranum frægast til nyttu, soleiðis at hesum verða tryggjað eitt heilsuverk og eitt sjúkrahúsverk á einum forsvarligum kvalitativum støði.

Somuleiðis eri eg sinnaður at reka ein politikk, sum miðar ímóti at bygnaðurin innan sjúkrahúsverkið verður broyttur, soleiðis at avgerðir kunnu ábyrgdast. Við øðrum orðum, at ábyrgd og avgerðarrættur verða savnað.

Tað er somuleiðis mítt mál, at føroyski borgarin fær innlit og vitan um, hvørjar tænastur honum verða veittar, tá ið hann hevur tær fyri neyðini.

Joannes Eidesgaard
landsstýrismaður

NINTENDO
(uttan spæl)
895,-
FØROYA TELDUBÚÐ
Dr. Jakobsensgøta 16
Tlf. 16010